gult18 cyan18 magenta18 svart18



ÚT AT KOYRA

## Yaris diesel



Seinast í hesum árinum koma Toyota Yaris og Yaris Verso við einum nýggjum 1,4 litur common-rail dieselmotori við 75 hk. Oljunýtslan verður 23,8 km/l við blandaðari koyring.

*Kelda: Toyota Family*

## Passat Stavad




Orsøkin til at hesin VW Passat V6 4Motion luksusbilurin er uppkallaður eftir fyrrverandi skattamálaráðharranum, Ole Stavad, er at hann í fjør broytti lógina soleiðis at tað loyst seg best at keypa ein firmabil undir 487.500,-. Passat Stavad kostar kr.487.498,- í Danmark.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Ekstra Large Vitara



Suzuki, sum standa fyri einum triðingi av øllum fýrahjólsdrivnu bilunum í Danmark, koma í heyst við tí størsta Suzuki nakrantíð, einum 7 persóna Grand Vitara XL-7 við 2.7 litur V6 24V motori og 173 hk. Møguliga kemur ein dieselútgáva seinni.

*Kelda: Motor Magasine*

# Peugeot 206 CC - cabriolet og coupé

*Her er Peugeut 206 CC sum coupé0*



**Tað sermerkta við Peugeot 206 CC, er at man faktiskt fær tveir ymiskar bilar í einum. Ein opnan cabriolet til summar og sól, og ein smartan coupé, til ein lutfalsliga lágan prís.**

*Magnus Gunnarsson*

Peugeot 206 CC er ein 2+2 bilur. Tað vil siga at tvey fólk sita væl framman, meðan baksetrini eru at rokna sum barnasetur. Á bilum sum hava sjálvberandi karossarí, er takið við til at halda bilinum saman. Tí er 206 CC væl styrktur undir dúrkinum, og millum kabinuna og viðførisrúmið, eins og stálrør eru í rútarammuni til forrútin, so hann tolir harðan stoyt, um bilurin skuldi bólta runt.

### Takið í viðførisrúmið

Bókstavirnir CC, standa fyri Coup de Coeur, ið merkir - hjartans útvaldi - á fronskum, ella Coupé Cabriolet, sum bilurin í roynd og veru er. Tí takið kann uttan trupulleikar leggjast niður í viðførisrúmið. Takið er lætt at leggja saman, við at loysa tvey handtøk, og trýsta á ein knøtt millum setrini. Hetta tekur eini 25 til 30 sekund. Tá takið er lagt saman í viðførisrúmið, er lítið og onki pláss eftir til viðførið. Tvær motorstøddir eru at velja ímillum, ein 1.6 litur við 110 hk, og ein 2.0 við 138 hk

### Smartur bilur

Peugeot 206 CC er ein sera smartur bilur, sum fæst í fleiri nútímans litum, sum passa væl saman við intrekkinum. Hetta er ein bilur sum hóskar væl til okkara veðurlag, við tað at man hevur ein smartan coupé at koyra við alt árið, og lætt er at taka takið av ein góðan summardag. Eftirspurningurin eftir 206 CC er sera stórur, og hann kostar kr.190.000,- hjá P/F Meinhardt Arge.



*Peugeot 206 CC Cabriolet. Takið er í viðførisrúðminum*

gult19 cyan19 magenta19 svart19

ítróttur

Nr. 116 • hósdagur • 21. juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# FCK missir ikki málverjan




*Stóra DM-steypið, sum Myhre her sæst hyggja at saman við Toda, hevur ivaleyst gjørt sítt til, at norðmaðurin kortini hevur hug at halda fram í felagnum*

**Eftir øllum at døma verður norski landsliðsmálverjin eisini við FCK komandi kappingarár**

DANMARK
*Jákup Mørk*

Tað hevur ljóðað, at norski málverjin hjá donsku meistarunum úr FCK, Thomas Myhre, ikki hevur havt hug at støðast í felagnum, sum hann hevur læntur til í hálvt ár.

Myhre hevur áður vart málið hjá Everton, men av fíggjarligum ávum vildu onglendingarnir ikki nýta hann longur.

Tí hevur hann nú verið í FCK, men sjálvur sigur norðmaðurin seg hava hug at royna seg í londum, har kappingin er harðari enn í Danmark.

Um tað eru útlitini fyri Champions League fótbólti, ella um orsøkin er ein onnur, er ikki greitt, men keldur í FCK vita nú at siga, at felagið er nærum komið ásamt við málverjan um sáttmálaviðurskiftini.

Sostatt bendir á, at Myhre framvegis verður í FCK komandi kappingarár, tá liðið skal royna at vinna seg fram í sterkastu europeisku kappingini.

# Skálafjarðarsigling

**Leygardagin skipaði felagið, Seglið, fyri kappsigling á Skálafjørðinum**

KAPPSIGLING
*Jákup Mørk*

Sagt verður frá fyrireikarunum, at talan til tíðir gjørdist um eina rættiliga harða skáksigling út á málið. Frískligi eystanvindurin gjørdi tað tungt hjá siglarunum at vinna fram, men kortini varð kappsiglingin avgreidd í øllum góðum.

Vit hava fingið úrslitini sendandi, og verða tey prentað niðanfyri.

| Nr. | Bátur: | Manning: | Bygd: |
|---|---|---|---|
| 1 | Svanur | John Mikkelsen og Sóleyg Mikkelsen | Skála |
| 2 | Búgvin | Per Mikkelsen og Jónsvein Mikkelsen | Toftir |
| 3 | Falkurin | Kári Hansen og Remi Hansen | Strendur |
| 4 | Mia | Sæbjørn Nielsen og Rodmund Nielsen | Glyvrar |
| 5 | Helga | Kai Johannessen | Kaldbak |
| 6 | Ósi | Agnar Olsen | Hósvík |
| 7 | Miðgerð | Arngrím Petersen, Elin Maria, Magnus Fr. | Kollafirði |
| 8 | Ternan | Kristian Hansen og Magnus H. | Hósvík |
| 9 | Vinur | Óli Mikkelsen, Kári og Petur | Tórshavn |
| 10 | Brynhild | Símun Klein og Andras Poulsen | Glyvrar |
| 11 | Havgásin | Edvard Hermansen | Hósvík |
| 12 | Gjáarbáturin | Janus Petersen og Eldbjørn Joensen | Kollafirði |
| 13 | Mouritsarbátur | Alfred Gullbein og Magnus í Hoyvík | Havn |
| 14 | Leivur | Bjarni Petersen | Kollafirði |

**Ikki á mál:**

| | | |
|---|---|---|
| Hoyvíksbáturin | Egil Simonsen og Jóhan S. | Hoyvík |
| Sørin | Hans Pauli Jacobsen og Jørgin Joensen | Kolbanargjógv |
| Rakul | Trygvi Samuelsen og Ena S. | Toftir |
| Durita | Charles Jacobsen | Saltangará |

*Regin Debess, undir Høganesi, 650 Toftir.*

# Jóansøka

**Niðanfyri verður víst, hvussu nummarrøðin verður á bátinum, tá næsti FM-róðurin á árinum skal avgreiðast á jóansøku**

| | |
|---|---|
| 5 | Tjaldrið |
| 6 | Sílið |
| 7 | Fípan Fagra |
| 8 | Blikur |
| 9 | Hvassi |
| 10 | Havfrúgvin |
| 11 | Firvaldur |
| 12 | Snípan |
| 13 | Báran |

**5-mannafør dreingir**

| | |
|---|---|
| 1 | Firvaldur |
| 2 | Drekin |
| 3 | Fípan Fagra |
| 4 | Sílið |
| 5 | Blikur |
| 6 | Tjaldrið |
| 7 | Frúgvin |
| 8 | Havfrúgvin |
| 9 | Erla Kongsdóttir |
| 10 | Beinta |

**6-mannafør kvinnur**

| | |
|---|---|
| 1 | Snopprikkur |
| 2 | Fortuna |
| 3 | Hvessingur |
| 4 | Jarnbardur |
| 5 | Sølmundur |
| 6 | Páll Fangi |
| 7 | Víkingur |
| 8 | Gongurólvur |
| 9 | Leirvíkingur |
| 10 | Lómur |

**5-mannafør gentur**

| | |
|---|---|
| 1 | Dúgvan |
| 2 | Drekin |
| 3 | Frúgvin |
| 4 | Ørnin |

**6-mannafør menn**

| | |
|---|---|
| 1 | Gongurólvur |
| 2 | Páll Fangi |
| 3 | Hvessingur |
| 4 | Riddarin |
| 5 | Strálan |
| 6 | Sølmundur |
| 7 | Snopprikkur |
| 8 | Fortuna |
| 9 | Fuglfirðingur |
| 10 | Lómur |

**8-mannafør**

| | |
|---|---|
| 1 | Ørvur |
| 2 | Argjabáturin |
| 3 | Knørrur |
| 4 | Nevið Reyða |
| 5 | Kvívíkingur |
| 6 | Ormurin Langi |

**10-mannafør**

| | |
|---|---|
| 1 | Vágbingur |
| 2 | Nólsoyingur |
| 3 | Vestmenningur |
| 4 | Havnarbáturin |
| 5 | Eysturoyingur |
| 6 | Skálabáturin |

# Schmeichel verður

**Peter Schmeichel hevur nú alment boðað frá, at hann ongar ætlanir hevur um at sleppa Hvidovre upp á fjall**

DANMARK
*Jákup Mørk*

Hetta sigur hann, nú fjølmiðlarnir í einar tvær vikur hava gitt dúgliga um, hvar framtíðin hjá metmanninum á danska landsliðnum fór at verða.

Schmeichel keypti fyri hálvum øðrum ári síðani partapeningin í Hvidovre, har hann eisini hevur spæl sjálvur, og útmeldingarnar eftir keypið´vóru greiðar. Felagið skal aftur fram í oddin í donskum fótbólti, og umfatandi broytingar vórðu eisini gjørdar. Jan Sørensen varð knýttur at felagnum sum manager, og fleiri leikarar vórðu eisini fingnir til vega. Millum hesar var føroyski landsliðsleikarin, Óli Johannesen.

Fyrsta árið var tó eitt vónbrot úrslitaliga, tí Hvidovre rakk ikki meira enn einum 10. plássi. Kanska hevur hetta eisini verið viðvirkandi til at seta ferð á gitingarnar um framtíðina hjá Schmeichel, sum í fjølmiðlunum m.a. hevur verið settur í samband við bæði Brøndby og Manchester United.

Á www.onside.dk, sigur Schmeichel tó nú, at hann heldur á fram við ætlanum sínum í Hvidovre, og at hann annars gleðir seg til eina langa summarfrítíð.